**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**


# KVØLDSKRÁ Á HANDILSSKÚANUM í Havn, heysthálvan 2000

INNSKRIVINGARSEÐIL

| | |
|---|---|
| Ættarnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tel arbeiðspláss: |
| Postnr./bygd býur: | Tel heima: / Teldupost adr.: |

**FHS-stakroyndir** (setið kross)

| | | |
|---|---|---|
| Virkisbúskapur C | mikud. 18.00-20.30 | ☐ |
| Kunningartøkni C | mánad. og mikud. 20.30-22.00 | ☐ |
| Marknaðarførsla C<br>Próvtøkur í mars/apríl | mánad. 18.00-20.30 | ☐ |

**HH-stakroyndir**

| | | |
|---|---|---|
| Støddfrøði B-stigi<br>(kravt til TSÚ og HD) | týsd. og hósd. 20.15-21.45 | ☐ |
| Virkisbúskapur B-stigi<br>Próvtøka í mai. | týsd. og hósd. 20.15-21.45 | ☐ |

**Merkonom**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leiðsla og samstarv | mikud. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Virkisfyriskipan | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Virkisbúskapur | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Marknaðarføringsplanlegging | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Starvsfólkafyrisiting | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Ársroknskapur | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| KT-í fyrisitingini | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Keyp | hósd. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Millumlanda distributión | mánad. | 18.00-20.30 | ☐ |
| Kreativar loysnir | týsd. | 18.00-20.30 | ☐ |

**Kostnaður:**

| | |
|---|---|
| Merkonom, luttøkugjald: | kr. 400,00 fyri hvørja lærugrein |
| FHS og HH stakroyndir: | kr. 300,00 innskrivingargjald |
| Depositum: | kr. 250,00 fyri hvønn persón- |

**FHS**

Tey sum hava eina miðnámsútbúgving, t.d. studentsprógv kunnu fáa FHS prógv við at taka hesar lærugreinar:

- Virkisbúskapur C
- Marknaðarførsla C
- Kunningartøkni C

Ein vallærugrein, har valt verður millum Vinnulívsrætt C, Altjóðabúskap B. Virkisbúskap B, Marknaðarførslu B, Kunningartøkni B ella eina økislærugrein, sum í minsta lagi hevur 105 tímar.

**Merkonom**

Merkonom próvtøkur verða í desember 2000 ella januar 2001, undantikin er Marknaðarføringsplanlegging, sum verður í mai 2001.
Allar merkonomlærugreinir hava tríggjar tímar um vikuna.
Á vári 2001 er ætlanin at bjóða hesar merkonomlærugreinir út:

- Grundlærugreinarnar
- Arbeiðsrætt
- Greining og fígging
- millumlanda vinnulívsrætt

Ætlanin er treytað av, hvørjar lærugreinar verða á heysti ár 2000.
Lýst verður nærri við hesum í desember ár 2000.

**Vanligar fortreytir:**
Útbúgving á handils- og skrivstovuøkinum. Hetta umfatar til dømis:
- Lærlingaútbúgving á handils- og skrivstovuøkinum
- FHS við vinnuroyndum í minst tvey ár
- HH við vinnuroyndum í minst eitt ár

Ella
- At umsøkjarin hevur aðra fakliga útbúgving

Ella
- At umsøkjarin heur relevantar vinnuroyndir í minst tvey ár, og skúlin metir hann at vera egnaðan.

**Serligar fortreytir:**
Í nøkrum merkonomlærugreinum eru umframt vanligu fortreytirnar eisini serligar fortreytir kravdar.

- Í Virkisbúskapi krevst kunnleiki til roknskap svarandi til 30 tíma undirvísing.
- Í Keypi krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisbúskapi ella HH.
- Í Ársroknskapi krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisbúskapi á merkonom ella hevur HH.
- Í Greining og fígging krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisbúskapi og Ársroknskapi.
- Í Marknaðarføringsplanlegging krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisbúskapi, Almennari marknaðarførslu, Marknaðargreining og -Strategi ella hevur HH.
- Í Millumlanda distributión krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisbúskapi.

**Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara**

**Freistin at tekna seg til kvøldskúlan er 9. august á r 2000. Skúlagongdin byrjar mánadagin 28. august 2000. Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku. Skúlin er stongdur vegna summarfrí frá 7. juli til 4. august.**

undirskrift — dagur

FØROYA HANDILSSKÚLI - Postrum 177 - 110 Tórshavn - Tel 317177 - Fax 313374

# Leiðari til Nólsoyar Dagstovn

Við hesum verður starvið sum leiðari á Nólsoyar Dagstovni lýst leyst at søkja. Nólsoyar Dagstovnur hevur virkað sum ein royndarskipan í eitt ár. Royndartíðin er úti 31. juli 2000 og hevur bygdaráðið samtykt at dagstovnurin skal opnast aftur eftir summarferiuna sambært nýggju dagstovnalógini (Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt).

Endamáli hjá stovninum skal m.a verða :

- við umsorgan í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling,
- at menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti til at styrkja teirra sjálveika, sjálvsvirði, sjálvskenslu og evni at taka sær av egnum viðurskiftum á ein friðarligan og samstarvandi hátt,
- í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í tøttum samspæli við náttúruna.

**Uppgávur**
Talan er um eitt sera áhugavert starv har leiðarin í samstarvi við kommununa og foreldrini kemur at menna stovnin sambært endamálinum omanfyri. Á stovninum verða eftir summarfríðtíðina uml. 15 børn. Í Nólsoy eru góðir møguleikar fyri mennandi tiltøkum til børnini. Í bygdini er fjøra við sandstrond og høgligt er at fara túrar við børnunum í hagan eftirsum eingir bilar eru. Harumframt er møguleiki fyri samstarvi við skúlan um m.a. nýtslu av fimleikarhøllini til innandura tiltøk.

**Førleika krøv**
Umsøkjararnir skulu hava útbúgving sum námsfrøðingur (pedagogur). Um eingin við námsfrøðiligari útbúgving søkir, kann leiðari við aðrari viðkomandi útbúgving verða settur í starv fyribils. Dentur verður lagdur á samstarvsevnir, og at viðkomandi hevur hegni til at leiða og fordeila arbeiðið á stovninum.

**Setanartreytir og umsókn**
Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag. Umsókir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**Nólsoyar Kommuna,**
**FO-270 Nólsoy**

Umsóknirnar skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi **týsdagin 25. juli 2000 kl. 16.00**. Brævbjálvin skal merkjast dagstovnaleiðari. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan Hansen, bygdaráðslim, tlf. 327161.


**DANNY TRANSPORT**
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
**Tlf. 319192**





variant

**Galvaniseraðir viðfestisvognar**



*Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!*

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



Original
bosal
Útstoyt



ES

**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjørður**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**





**Skorsteins-sóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

**Jimex Brenniovnar**
**Isokern Skorsteinsbjálving**
**Isokern Skorsteinselementir**
**Lúkur - Fuglaristir**
**Ventilar - Roykhattar**

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass


HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Skrivstovunæmingur

Á skrivstovuni á Heilsufrøðiligu starvsstovuni er eitt nýtt læruplass leyst at søkja sum skrivstovunæmingur.

Skrivstovan er tænastudeild fyri Heilsufrøðiligu starvsstovuna, so talan er um eitt sera fjøltáttað læruplass, har tú í lærutíðini fært møguleika at menna tín førleika innanfyri hesi øki:

- Samskifti sum heild, bæði innanhýsis og við viðskiftarar
- Postskipan
- Journalisering
- Lønarviðurskifti sum heild
- Bókhald, herundir debitor- og kreditorstýring
- Onnur øki sum hoyra til skrivstovuna á stovninum.

Av tí at skrivstovan er tænastudeild fyri allan stovnin, eru arbeiðsuppgávurnar sera fjøltáttaðar, og sum oftast er arbeiðsbyrðan sera stór.

Vit kunnu bjóða eitt læruplass, har nýggjasta tøkni er grundarlagið undir øllum virkseminum á skrivstovuni. Undir útbúgvingini verður møguleiki at luttaka á skeiðum, sum hava týdning fyri læruna.

Skikkað at søkja starvið eru tey, sum hava lokið HH-prógv (lærutíðin er tá 2 ár), FHS (lærutíðin er tá 3 ár) ella students-, HF- ella HT-útbúgving (lærutíðin er tá 2 ár og 18 vikur).

Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið, sí http://www.lnd.fo. Um lærutíðin er 2 ár, er lønin tey bæði læruárini ávikavist 60 og 70% av lønini í 12. flokki, og um lærutíðin er 3 ár, er lønin ávikavist 50, 60 og 70% av lønini í 12. flokki.

Hevur hetta tín áhuga, so ert tú vælkomin at søkja læruplássið. Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. juli 2000.

Tú kanst byrja læruna mánadagin 14. august 2000 ella eftir nærri avtalu.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Hjørdis Næs, lærumeistara, ella Bárð Enni, stjóra.

Debesartrøð
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo
http://www.hfs.fo

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY


sosialurin
Altið fyrst við
www.sosialurin.fo


# Fíggjarleiðari

Fyri kunda okkara Fuglarfjarðar Kommunu, søkja vit eftir einum fíggjar- og roknskaparkønum fólki at byrja ***15. august 2000*** ella skjótast gjørligt eftir hetta.

Talan er um eitt áhugavert fulltíðararbeiði og fevnir um at fyrisita m.a.:

- ❒ dagliga bókhalds-, roknskapararbeiði og avstemming
- ❒ umsita og avstemma ognara- og skuldarabókhaldið
- ❒ uppseta mánaðar- og ársroknskapir og fíggjarætlanir
- ❒ fíggarstýra lán og innistandandandi, innan- og uttanlands
- ❒ menna mannagongdir og edv v.m. á fíggjarliga økinum
- ❒ annars alt vanligt skrivstovuarbeiði

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, tí er tað avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, roknskapar-, og telduarbeiði. Kunnleika til kommunuskipanir hevur fyrimun.

Fyri ein, ið kundi hugsað sær eitt sjálvstøðugt og fjøltáttað arbeiði við góðum arbeiðsviðursskiftum og góðum persónligum menningarmøguleikum, er hetta tað rætta starvið, ið setur stór krøv til tann menniskjansliga og fakliga førleikan.

Løn eftir avtalu.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt, góð samstarvsevni og hevur *hollar royndir* innan bókhalds-, roknskapar og fíggjaryrki, við ástøðuligari útbúgving, eitt nú HA, HD ella aðra viðkomandi útbúgving, so er tú tann, ið vit søkja.

Nærri fæst at vita við at ringja tel. 31 47 00 og spyrja eftir Alva Nielsen ella Jógvan Amonsson.

Skrivlig umsókn við avrit av møguligum prógvum og ummælum verður at senda innan 04. august 2000 til:

INPACT INTERNATIONAL

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT**
**statsaut. revisorar**
R. C Effersøesgøta 26 • Postrúm 191
FO-110 Tórshavn • Tel. +298 314700 • Telefax -298 313815
E-mail: inpact@post.olivant.fo
www.inpact.fo

# ÚTFERÐ FYRI VESTAN

**Farið verður frá Kagganum við bussi kl. 10.00 leygardagin 08. juli niðan á Sornfelli (Skeiðsskarð), og haðani gingið fyri vestan undir Sornfelli og um Skoradal framvið Seyðaskor til Norðadal og síðani við bussi aftur til Kaggan. (Túrurin tekur uml. 6 tímar).**

**Aftaná verður ábit í Kagganum.**

**Tekningarlisti liggur í barrini.**
**Kostnaður kr. 80,-**

Kaggin

Sosialurin - 311820